Kyrjasteinur er drigin upp í fjøruna beint innan fyri nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði

Mynd: Edvard Joensen

Kyrjasteinur settur á land

Kyrjasteinur, sum lá sokkin á Fuglafirði eina tíð, er tikin upp aftur og settur á land í Fuglafirði. Har skal hann gerast til savn

SKIPSSAVN
Edvard Joensen

Fuglafirði: Kyrjasteinur er nú settur á land í Fuglafirði og verður fyrsta dagin drigin flóðfríur. Hann skal síðan riggast til minni um skonnarttíðina.

Tað er áhugafelagið Karvatoftir, sum mannað er av fuglfirðingum, búsitandi uttan fyri Fuglafjørð, sum eigur Kyrjastein. Skipið varð keypt úr Porkeri fyrst í nítiárunum við tí fyri eyga at rigga tað aftur í gamlan stand og nýta sum savn.

Óla Hendrik av Fløtum er ein teirra, sum myndar felagið Karvatoftir. Hann greiðir frá, at Kyrjasteinur er gamalt fuglafjarðarskip, og tí er serliga stuttligt at hava fingið hann aftur til Fuglafjarðar.

Hann er smíðaður í 1936 og kom á vári 1937 til Fuglafjarðar. Hann er smíðaður sum skonnart, men varð ongantíð skonnart-riggaður, greiðir Óla Hendrik av Fløtum frá.

Tá Kyrjasteinur var nýggjur, vóru motorarnir komnir í skipini, og teir vunnu so á seglunum, sum minkaðu, so hvørt sum motororkan vaks.

Kyrjasteinur varð riggaður sum galeasa og hevði ongantíð triðju mastrina, sum skonnartin annars eigur.

Hann hevði eina 120 hk. maskinu, tá hann kom. Men hon varð skjótt skift út við eina størri, og Boðasteinur, sum Haraldsen eisini átti, fekk maskinuna úr Kyrjasteini.

Sama navnið

Kyrjasteinur var merktur FD 185, tá hann kom til Fuglafjaðrar. Síðan hevur hann havt ymisk nummur, eftir sum hann hevur ferðast í landinum. Sinast var hann í Porkeri. Men alla tíðina hevur hann itið Kyrjasteinur, og tað fer hann eisini framhaldandi at gera, sigur Óla Hendrik av Fløtum.

Kyrjasteinur varð her fyri tikin upp í fjøruna innanvert nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði, og stendur nú á landi sum ein annar søguligur varði í hesum umhvørvinum.

Óla Hendrik av Fløtum sigur, at teir fara í næstu viku, tá harður streymur verður aftur, at draga hann einar seks-átta metrar longur niðan í fjøruna, soleiðis at hann tá fer at standa flóðfríur.

Teir hava lagt lunnar undir hann, so hann ikki søkkur niður í sandin, greiðir Óla Hendrik frá.

Kyrjasteinur varð rættiliga avriggaður, eftir at hann kom aftur til Fuglafjarðar í nítiárunum. Alt var tikið oman av omandeks, og eisini undir dekki varð tað mesta tikið úr. Lugarskottið og maskinskottið standa tó eftir í skrokkinum. Annars er bara dekkið eftir, eins og stórmasturin, sum helst verður tikin úr, meðan arbeitt fer at verða upp á skipið.

Óla Hendrik av Fløtum sigur, at nú beinanveg verður Kyrjasteinur bara drigin longri niðan í fjøruna. Men sum dagarnir fara at leingjast, væntar hann, at teir fara undir at arbeiða upp á skipið at fáa tað sett í stand.

Skonnartirnar

Endalig støða er ikki tikin til, hvussu hann skal riggast. Um tað skal vera, sum hann sá út, tá hann kom til Fuglafjarðar í 1937, ella hann møguliga skal gerast til eina fullriggaða skonnart.

Óla Hendrik av Fløtum undrast á, at so at siga einki verður tosað um skonnarttíðina í Føroyum.

– Vit hoyra so at siga bara um slupptíðina, hóast skonnartirnar vóru tann longdi armurin, um vit kunnu siga so, hjá sluppunum. Tær vóru tey størru skipini, og tað var við teimum, at føroyingar fóru bæði til Grønlands og New Foundlands at fiska, vísir hann á.

At ein skonnart kemur at standa í Fulgafirði, er eisini upp á sítt pláss, heldur hann, tá hugsað verður um, at fuglfirðingar rættiliga tíðliga fingu sína fyrstu skonnart. Tað ver Florence, sum kom til Fuglafjarðar í 1892. Hon varð ásigld og sakk á Norðhavinum 29. mars 1902. Altso fyri 100 árum síðan.

Óla Hendrik av Fløtum heldur tað vera ov lítið gjørt við at varðveita alla okkara skipasøgu.

Slupp er onkur hendinga, men tær hava tað ikki gott. Westward Ho liggur skerd á Havnini, og Johanna verður leigað út. Hvalabátar hava vit átt, men har er eingin eftir, og so allir smáu motorbátarnir. Har er eisini bara onkur hendinga, sum goymdur verður, harmast hann um.

Nú er so Kyrjasteinur komin at standa, men tað fara væntandi at ganga eini átta ár ella kanska meira - sum teir hava roknað við - til hann er liðugur at brúka til savn, sigur Óla Hendrik av Fløtum.

Felagið Karvatoftir, sum eigur Kyrjastein, er sjálvsognarfelag, sum stovnað er til endamálið.

Teir, sum manna nevndina í felgnum í dag, eru umframt Óla Hendrik av Fløtum, Benny Samuelsen, og Jógvan Róin, fuglfirðingar í Havn saman við Johan Petersen, fuglfirðingi á Glyvrum.

Ætlanin hjá teimum er, at tá Kyrjasteinur er liðugur, skal hann latast Fuglafirði í varðveitslu. Tað vil siga Fuglafjarðar Býráði og Fuglafjarðar Fornminnisfelag, sigur Óla Hendrik av Fløtum.

Deildarstjórin á Fiskivinnustovuni, Andrass Kristiansen:

Lodnan í føroyskum sjógvi ikki roknast av aðrari kvotu

Landsstýrið heldur ikki, at føroyska lodnan eigur at roknast av kvotuni í íslendskum ella grønlendskum sjógvi. - Vit hava ikki skyldu at boða íslendskum myndugleikum frá lodnufiskiskapi í føroyskum sjógvi. Fiskiskapurin, sum nú hevur tikið seg upp, er ikki við í avtaluni landanna millum, sigur deildarstjórin.

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Andrass Kristiansen sigur, at tríggir partar hava havt lodnuna um hendi, sum vit hava fiskað av; tað eru Noreg, Ísland og Grønland. - Nú verður spennandi at vita, um Føroyar verða tann fjórði parturin,sum kemur at sita á lodnuni, sigur hann.

Nú lodna á fyrsta sinni verður fiskað í føroyskum sjógvi, var væntandi, at spurningurin um føroysku lodnukvotuna í eitt nú íslendskum -og grønlendskum sjógvi fór at taka seg upp. Og so varð.

- Týsmorgunin ringdi embætismaðurin í Íslandi, sum hevur ábyrgdina av millumlandasamráðingunum vegna Ísland. Hann helt, at lodnan, sum nú verður fiskað í føroyskum sjógvi, eigur at roknast uppí tey 30.000 tonsini, vit hava loyvi at fiska í íslendskum sjógvi.

Hetta sigur Andrass Kristiansen, sum er deildarstjóri á Fiskivinnustovuni. Hann vísir tó á, at enn er einki formelt skriv komið úr Íslandi um hesi sjónarmið.

Ikki samdur

Men føroyskir myndugleikar eru ikki samdir.

- Nú er hetta so nýtt, og enn veit eingin, hvussu umfatandi fiskiskapurin verður, og um hann verður afturvendandi.

Andrass sigur, at landsstýrið heldur ikki, at føroyska lodnan eigur at roknast av kvotuni í íslendskum ella grønlendskum sjógvi, sum er uppá tilsamans 40.000 tons.

- Vit hava ikki skyldu at boða íslendskum myndugleikum frá lodnufiskiskapi í føroyskum sjógvi. Fiskiskapurin, sum nú hevur tikið seg upp, er ikki við í avtaluni landanna millum, sigur hann.

Sera áhugavert

Andrass Kristiansen heldur tað annars vera sera áhugavert, at føroysku skip nú raktu við lodnu í egnum sjógvi.

- Skipini fingu lodnu uppat føroyska markinum í fjør, men tá var eingin fiskiskapur í okkara sjógvi. Hann vísir á, at tríggir partar hava havt lodnuna um hendi, sum vit hava fiskað av; tað eru Noreg, Ísland og Grønland.

- Nú verður spennandi at vita, um Føroyar verða tann fjórði parturin,sum kemur at sita á lodnuni.

Andrass Kristiansen væntar ikki, at seinasta orðið er sagt enn um veiðina, sum nú er í føroyskum sjógvi.

- Helst kemur málið upp at venda í onkrum seinni føri. Men hetta veldsteisini um, hvussu umfatandi fiskiskapurin verður, leggur hann aftrat.

Landsstýrið eigur at bera útreiðslurnar

Kommunusamskipan Føroya hevur sent landsstýrinum opið brævi, har gjørt verður vart við, at landsstýrið sjálvt eigur at bera útreiðslurnar í sambandi við skattalættan hjá pensjónistum

SKATTUR
Eirikur Lindenskov

Kommunusamskipan Føroya hevur á fundi umrøtt mál landsstýrisins um skattalætta til pensiónistar og ynskir at viðmerkja, at kommunurnar í Kommunusamskipan Føroya taka fult og heilt undir við skattalætta til pensiónistarnar, men átalar og er harðliga ímóti, at landsstýrið við lógaruppskotinum ikki sjálvt ber útreiðslurnar av skattalættanum í landsskattinum, og at kommunurnar í kommunuskattinum skulu bera áleið eina helvt av útreiðslunum.

Kommunurnar skulu rekast við ábyrgd yvirfyri teirra borgarum og laga sínar útreiðslur við grundarlagið í frammanundan lagdari fíggjarætlan. Hetta merkir, at fíggjarætlanin fyri fíggjarárið 2002 longu varð samtykt áðrenn 1. oktober 2001.

Fíggjarætlan kommununnar verður gjørd í bestu sannføring út frá tí tørvi og orku, sum tað verður mett fíggjarliga forsvarligt at reka kommununa og við at liti til at tæna borgarunum á besta hátt.

Beint fyri jól kom út bóklingurin "Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur", sum ein arbeiðsbólkur settur av løgmanni hevur gjørt, og á síðu 89 seinast undir 3.2 Skattaskipan, verður nevnt: "Kommunurnar eiga at verða skaðaleysar av umbýti og frádráttum í skattaskipanini, tó so at barnafrádrátturin eigur at verða borin av kommununum, so leingi tær áseta hann sjálvar."

Við uppskotinum um skattalætta til pensiónistar hevur landsstýrið ikki víst á, hvaðani tann írestandi inntøkan skal koma frá til at gjalda skattalættan við.

Landsstýrið eigur at virða kommunala sjálvræði og frælsi og ikki koma við ófráboðanum uppskotum og sum eru útreiðslukrevjandi fyri kommunurnar, eftir at fíggjarætlanin kommununnar er løgd. Hetta kann fullkomiliga taka støði undan inntøkugrundarlagnum hjá kommununum og eina útreiðslu, sum ikki varð roknað við frammanundan. Hetta kann eisini viðføra, at kommunurnar koma í fíggjarligt óføri og máar støði undan tí fíggjarligu sjálvsábyrgdini hjá kommununum.

Kommunusamskipan Føroya vil tí heita á landsstýrið um at vísa á, hvaðani tann írestandi inntøkan skal koma frá til at gjalda skattalættan við, uttan at hetta á nakran hátt kemur at nerva løgdu fíggjarætlanir hjá kommununum.

Kommunurnar bera ikki allar útreiðslurnar

– Vit hava tikið hædd fyri, at broytingarnar í skattinum hjá pensjónistum rakar kommunurnar. Tí fáa tær endurgjald á øðrum økjum, sigur løgmaður

SKATTUR
Eirikur Lindenskov

– Tað er ikki heilt rætt at siga, at landsstýrið við skattalættanum til pensjónistar leggur allar útreiðslurnar á kommunurnar.

Hetta segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, við útvarpið mánakvøldið í sambandi við úttalislini hjá Kommunusamskipan Føroya.

Løgmaður vísti á, at tað sum er óheppi í hesum máli er, at landið hevur latið kommunum eitt endurgjald, sum nú fellur burtur.

– Men vit hava tikið hædd fyri hesum broytingum, og hava tí gjørt aðrar broytingar, so kommunurnar ikki bera allar útreiðslurnar, segði løgmaður.

Anfinn Kallsberg heldur, at Kommunusamskipanin helst ikki hevur kent til allar broytingarnar sum verða gjørdar í ásetingarlógini.

– Hetta kemur at raka kommunurnar nakað, men als ikki í so stóran mun, sum kommunurnar ávara ímóti, sigur løgmaður, sum kortini gevur teimum rætt í, at tað líkist ongum altíð at koma so seint við skattalógarbroytingum, at kommunurnar ikki kunnu fyrireika hetta í fíggjarætlanunum.

Løgmaður vísir á, at politisku viðgerðirnar altíð gerast í so drúgvar.

ÚTSØLAN byrjar hósdagin 24-01 kl. 9.00

Klædnings- & vindjakkar · buksur · troyggjur
skjúrtur & nógv nógv annað

Opið er til kl. 20.00

JUNGMANN
Saltangará · tlf. 448110 - Tórshavn · tlf. 322202